# Zacharias Heinesen 70 ár



Í dag, 19. mai, fyllir Zacharias Heinesen listamaður í Havn 70 ár. Zacharias er sonur navnframa rithøvundin og listamannin William Heinesen.

Zacharias er upprunaliga útbúgvin sum møbilsnikkari, men hansara listarligu gávur gjørdu, at hann longu í 50-unum byrjaði við síni málningalist og fór á Myndlista- og handíðaskóla Íslands og seinni á Kunstakademiet í Keypmannahavn.

Í 1965 kom hann heim aftur til Føroyar, og hevur hann síðan arbeitt sum listamaður burturav.

Hann hevur havt nógvar framsýningar bæði í Føroyum og uttanlands.

Umframt málningalistina arbeiðir Zacharias eisini við grafikki. Hann hevur gjørt bókamyndir, permur, plakatir, plátuumsløg v.m. Hann hevur t.d. teknað allar teir nýggjastu føroysku pengaseðlarnar, og fyri kortum fekk føroyski túsundkrónuseðilin virðisløn sum heimsins vakrasti pengaseðil í 2005.

Í samband við føðingardagin er ein framsýning í Åhuset í Brogade í Køge við olju- og vatnlitsmyndum hjá Zachariasi. Framsýningin er opin fram til 11. juni, opið er hósdag-sunnudag frá kl. 11-17.


Næmingar til Føroya Banka

## Set framtíðina í bankan



Vit leita eftir nøkrum ungum, ágrýtnum fólkum, sum skulu vera við til at leiða Føroya Banka inn í framtíðina. Vilt tú vera ein av okkum, so kunnu vit bjóða tær eitt avbjóðandi og læruríkt næmingapláss í einum áhugaverdum og spennandi umhvørvi.

Vit vænta, at tú hevur áræði, ert útvend/ur og umhugsin, og at tú dugir at arbeiða saman við øðrum.

Tað er fyritreyt, at tú hevur staðið HH, HF, student ella líknandi.

Send umsóknina í seinasta lagi 31. mai 2006 til:

**Føroya Banki**
*Postsmoga 3048*
*110 Tórshavn*
Att.: Bjarki Mohr

Skriva eitt sindur um, hví vit skulu velja júst teg. Við umsóknini skalt tú senda

- prógv frá loknari skúlagongd
- ummæli frá møguligum øðrum størvum

Les meira á heimasíðu okkara: www.foroyabanki.fo
Hevur tú annars okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, so send ein teldupost til: bjarki.mohr@foroyabanki.fo

Ætlandi verða næmingar settir á deildum bankans í Tórshavn, Norðurstreymoy, Vágunum, Klaksvík, Eysturoy og Suðuroy.



FØROYA BANKI


# Vilja geva ungdóminum nakað

Hjá Tofta Kvinnufelag eru tey farin í holt við eina kanning, sum hevur til endamáls at nøkta tørvin hjá ungdóminum í kommununi.

Heldur enn bara at grenja um, at einki er til ungdómin, valdi kvinnufelagið at gera eitt spurnarblað, sum næmingarnir í 7., 8., 9., og 10. flokki hava svarað.

Niðurstøðan av kanningini er, at tað er tørvur á einum stað har tey kunnu koma saman, til dømis einum ungdómshúsi. Eisini hóast nógv av teimum ungu nýta stóran part av frítíðini til ítróttarvirksemi.

Kanningin bleiv einans gjørd hjá eldru flokkunum, men staðfest verður tó eisini, at longu í triðja flokki er talan um ein trupulleika, tí tá er einki tilboð til børnini eftir skúlatíð.

Hóskvøldið verður skipað fyri fundi, har støðan hjá yngra ættarliðnum verður lýst. Eins og ljós verður varpað á vandan, sum kann standast av, um einki innihaldsríkt frítíðarítriv er at taka til.

Umframt umboð frá kvinnufelagnum, verða umboð frá Margarinfabrikkini í Havn, Bláa krossi, narkodeildini hjá løgregluni og ein heilsusystur eisini á fundinum.

-mørk

# Bent Fabricius Bjerre til Føroya

**Sunnudagin 11. juni hevur heimskendi klaversnillingurin, vinnulívsmaðurin, hittsmiðurin og kvinnudárarin Bent Fabricius Bjerre konsert í Norðurlandahúsinum**



KONSERT
*Tíðindaskriv*

Hvør kennir ikki eyðkennisløgini frá “Matador”, “Alley Cat”, “Olsen Banden”, “Forelsket i København” og mong mong onnur? Og hvør kennir ikki mannin handan klaverið – tann altíð unga Bent Farbricius-Bjerre, ella Bent Fabric, sum hann eisini rópar seg. Ungur í sinni. Hóast Bent Fabric hevur 81 ár á baki, stendur hann ongantíð í stað. Hann leitar áhaldandi eftir nýggjum avbjóðingum og megnar at endurnýggja seg sjálvan ferð eftir ferð. Unga unnustan, 38 ára gamla Camilla Arndt, er eitt livandi prógv um, at heldur ikki á tí økinum stendur á hjá honum at royna nýggjar leiðir.

# Nýggj djóraverndarnevnd

Fyri stuttum hevði Djóraverndarfelagið aðalfund, har nýggj nevnd skuldi veljast í felagið. Nýggja nevndin hevur skipað seg við Dianu Mouritsen sum formanni, Ann Didriksen er næstformaður, Jonna Justinussen er kassameistari, Sóley Haraldsen er skrivari og Vár Lamhauge er PR-fólk. Eisini eru Ránnvá Johansen og Alice Simonsen við í nevndini.

Djóraverndarfelagið hevur eina fartelefon, nr. 504533, sum nevndarlimirnir skiftast um at hava hjá sær. Adressan hjá felagnum er postsmoga 1365, 110 Torshavn, eisini hevur felagið eina teldupostadressu, djoravernd@kallnet.fo.

-mørk